# Klaksvíkingar ruddaðu borðið

*Kristian Suni Høgnesen uttast til vinstru gjørdist vinnari av stóru billardkappingini um Haldor Holm steypið og er hann fyrsti klaksvíkingur, ið vinnur kappingina. Sonhard Johannesen varð nr. 2 og Niklas Heri Jákupsson nr. 3*

*Mynd jan*





*Kristian Suni feldi túsundtals keylur á borðinum í Klaksvíkar Klubba seinasta vikuskiftið*

*Mynd jan*

**Heiðurin og minnið um slóðbrótandi arbeiðið Haldor Holm, sáli gjørdi fyri billardspælinum her á landi var fullgjørt, tá tað seinasta vikuskiftið eydnaðist klaksvíkingum at gerast bæði nr. 1, 2 og 3 í kappingini um Haldor Holm steypið.**

BILLARDKAPPING

Hóast kappast hevur verið um heiðurin at fáa sítt navn innskrivað í stóra steypið í meira enn 12 ár, so hevur tað ikki fyrr enn nú eydnast nøkrum klaksvíkingi at vinna kappingina. Og tá sigurin loksins skuldi fara til heimplássið hjá Haldor Holm, sála, so var tað ein av slitmonnunum í billardspælinum, Kristian Suni Høgnesen, sum vann bæði virðiliga og greiddliga.

Kristian Suni hevur spælt billard fyri Klaksvíkar Klubba í meira enn 15 ár og hevur hesa tíðina verið við til at vinna FM heitið fyri lið. Tað hevur tó ongantíð eydnast honum at vinna stórar einstaklingakappingar. Men nú skuldi tað so verða, og tað var eisini við maner, tí hesin gløggi og stríðshugaði billardspælarin vann so dyggiliga við meira enn 30 eygum í meðal.

Kristian Suni hevur verið við til fleiri FM kappingar fyri einstaklingar, men har hevur eydnan ikki verið við honum – enn. Tað skilst, at størsta ynskið hjá Kristiani er at seta krúnuna á verkið og gerast FM-meistari komandi. Fyrsti klaksvíkingurin, sum gjørdist føroyameistari var Sonhard Johannesen, sum tók táverandi meistaran Henrik Pedersen á bóli í avgerandi dysti á Tvøroyri fyri tveimum árum síðani. Í løtuni eigur Max Rasmussen FM-heitið. Verður Kristian Suni at vísa slíkt spæl hann gjørdi seinasta vikuskiftið til komandi FM kapping fyri einstaklingar, so er hann heilt greitt ein av favorittunum.

Nr. 2 í kappingini var heldur ikki til at "kimsa" at. Sonhard Johannesen hevði tá avtornaði 24 eygu í meðal, meðan enn ein klaksvíkingar, Niklas Heri Jákupsson gjørdist nr. 3 við umleið 18 eygum í meðal.

Tað var sum ikki einaferð Føroya Bjór, sum stuðlaði hesi 12. kappingini um Haldor Holm Steypið við steypum til nr. 1,2 og 3. Føroya Bjór hevur verið høvuðssponsor hjá hesi kapping øll árini umframt at lata steyp til aðrar FM-kappingar í billard, sum verða leiktar í Klaksvík.

FM-kappingarnar í billard byrja annars komandi vikuskiftið.




Vetrarferðaætlan

Útgávan av nýggju ferðaætlanini hjá Strandferðsluni er útsett í 2 mánaðir.

Hósdagin 1 . november verður tí farið yvir til vetrarferðaætlanina í verandi ferðaætlan.

Víst verður til heimasíðuna ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

VETRAR-DEKK

Allar støddir av vetrardekkum við ella uttan píkar á goymslu.

Ókeypis ásetan

Ringi og fái meira at vita

pf AUTO-VULK
FO-900 Vágur
Tlf. 373680 - 373660
223380
Fax 374680
VULKANISERING OG BILVERKSTAÐUR

Høvuðsreingerð

Frá A til Z til
Fyritøkur, Stovnar,
Skúlar, Privat, Skip
Teppireins, Bona G lv,
Fastar avtalur til vinnulívið

Vaskari & Reingering

Kvalitets reinger s ani 198
Tel • 21 13 12 • 31 63 00

Falkavegur 6, 2. hædd
FR-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: feagency@hfs.fo
www. hfs.fo

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

## Kunnandi fundur um Lokal Agenda 21

Fríggjadagin 2. november kl. 19.00 verður ein røð av kunnandi framløgum um Lokal Agenda 21 á Landsbókasavninum í Havn.

Agenda 21 (sum merkir skrá fyri 21. øld) er skjalið, sum varð undirskrivað á ST-ráðstevnuni í Rio í 1992, har heitt varð á øll lond um at arbeiða fyri einum reinari umhvørvi og eini betri umsiting av náttúrutilfeinginum. Lokal Agenda 21 vendir sær til kommunurnar fyri at fáa tær at taka lut í hesum arbeiði.

Tað verður Landsstýrismaðurin við umhvørvismálum, Eyðun Elttør, sum byrjar við at greiða frá ætlanunum at seta á stovn eina umhvørvisskrivstovu í Føroyum. Síðani koma umboð frá smærri kommunum úr Noregi, Íslandi og Svøríki at greiða frá teirra arbeiði við Lokal Agenda 21. Harafturat kemur Finnbogi Joensen úr Vestmanna at greiða frá arbeiðinum við at gera skúlan í Vestmanna til »grønan skúla«.

Nógvar kommunur, serliga í Norðureuropa, arbeiða við Lokal Agenda 21, og eisini smátjóðirnar rundan um okkum eru væl við.

Framløgurnar eru almennar, men eru serliga ætlaðar kommunum, skúlum o.ø., sum eru áhugað í Lokal Agenda 21 og umhvørvisspurningum sum heild.

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

## Dagrøktari

Dagrøktarskipanin í Klaksvíkar Kommunu søkir eftir dagrøktarum at byrja skjótast gjørligt.

Vit sóknast eftir fólk, sum:
- er áhugað í arbeiðinum sum dagrøktari
- er sinnaður at samstarva við sosialu deild
- fyritakssamur og skapandi
- kann geva barninum ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag
- hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- kann samskifta við foreldrini

Dagrøktarskipanin er í eini broytingartíð, hvar dentur verður lagdur á at menna tann einstaka dagrøktaran við ráðgeving og skeiðum. Vit kunnu somuleiðis bjóða eitt spennandi arbeiði, har møguleiki er fyri at vera saman við øðrum dagrøktarum í nýggjari spælistovu.

Meira fæst at vita við at venda sær til Jórun Niclasen, samskipara, ella Sigrun Vágstún, dagrøktarleiðara, á telefon 456388.

**Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. november 2001.**

**Klaksvíkar Kommuna**
Postsmoga 2
700 Klaksvík

Sosialurin
Sosialurin

Røktar- og umlættingarheimið
Lágargarður

**Lágargarður søkir eftir**

## sjúkrasystur

**til kvøldvakt**

Eitt starv sum sjúkrasystur til kvøldvakt á Miðstovu, lønarbrøkur 0,5 ella 0,7, er leyst at søkja skjótast til ber, ella eftir nærri avtalu.

Starvið er lønt sambært sáttmála ímillum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja 316788.

Skrivlig umsókn við neyðugum prógvum skal sendast til leiðaran á

**Lágargarði**
Stoffalág 84
Boks 1188
110 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er til 19.11.01.**

## Umvælingar
### - av urum og prýðislutum

Vit umvæla øll sløg av urum og prýðislutum. Stovuur, stadionur, skúlaur o.a.

Á okkara nútímans verkstaði hava vit nýggjastu útgerðina til stórar og smáar uppgávur. Og við okkara teldustýrdu graveringsmaskinu átaka vit okkum næstan allar graveringsuppgávur.

Kom inn í 3-aran og fá eitt prát við Nainu ella okkara nýggja ursmið, Johan.




## Góður diesel bilur

Ein reyður Nissan Primera diesel 2,0 við el-rútum og alu-felgum, árg. 6/95, í góðum standi, nýsýnaður, bíliga til sølu.

**Tlf. 217406 - 213388**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin